**Nám X Eysturskúlin**
**Tórshavn**

**Løgtingsmál nr. 5/2012: Uppskot til samtyktar um at skipa fjarlestur sum sjálvstøðuga skúlaskipan**

**Uppskot**
**til**
**samtyktar**

Løgtingið heitir á landsstýrið um at fyrireika og leggja fram lógaruppskot um at skipa fjarlestur frá bachelor til kandidatstøði sum eina sjálvstøðuga skúlaskipan undir Fróðskaparsetri Føroya.

**Viðmerkingar:**
á Fróðskaparsetri Føroya ber til at taka ymiskar bachelorútbúgvingar, men við hesum uppskoti hava næmingarnir møguleika til at lesa víðari til kandidat í Føroyum. Stórur tørvur er á hesum í Føroyum, og kundi hetta verið við til at ment útbúgvingarstøðið í Føroyum aftan á miðnámslestur.

Um Føroyar skulu yvirliva sum framsøkið vælferðarsamfelag, er neyðugt, at landskassin ber fíggjarliga partin av hesum átaki.

Eisini eigur Mentamálaráðið at fremja neyðuga lógarsmíðið á økinum.

Ein sannroynd er, at í útlondum er hetta eitt kent fyribrigdi. Fleiri og fleiri nema sær lestur gjøgnum teldusamskiftið og fyrilestrarkend øki. Nám X metir, at hetta eisini eigur at vera gjørligt í Føroyum.

Ein onnur grundgeving er, at vit steðga fólkafráflytingini við at fólk verða verandi í Føroyum og lesa. Væntandi er, at tann sosiali tørvurin verður nøktaður í størri mun, tá ið fleiri fjarlesandi hittast undir sama taki.

Nám X vil tí mæla til, at tómir, niðurlagdir skúlar/tómir skúlabygningar verða brúktir til fjarlestur.

Nám X mælir til, at Altjóða Skrivstovan umsitur samskifti og sambond við aðrar skúlar, ímeðan Mentamálaráðið skipar fyri útbúgvingum/leistum og innihaldi í fjarlestrinum.

**Á Løgtingi, 6. februar 2012**

| | | |
|---|---|---|
| Jens Petur Old | Páll Rasmussen Weihe | Benjamin Rajani |
| Rani Høgnason Hansen | Virgar Johansen | Egi Djurhuus |

Teitur Horn Baldvinsson    Benjamin Miné Midjord    Jógvan í Dímun Højgaard

Hervør Pálsdóttir